# Føroyskir sjómenn betri sømdir undir útlendskum flaggi



– Vit fara ikki at virka fyri, at Føroyar gerast eitt hentleikaflagg til manningarhýrur, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelag

**– Kunnu skiparar og stýrimenn ikki fáa nóg góða løn undir føroyskum flaggi, er tað betri at skipini eru undir útlendskum flaggi, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Føroyskir sjómen fáa betri sømdir undir útlendskum flaggi, enn teir fáa við at sigla undir føroyskum flaggi.

Hetta staðfestir Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagi.

Samráðingarnar um at gera sáttmála fyri navigatørarnar, sum sigla við skipum í oljuvinnuni eru slitnaðar og verkfall er nú á økinum.

Stjóran í Thor í Hósvík, Gunnbjørn Joensen, sum hevur sjey veitingarkskip, sigur at krøvini hjá Skipara- og Navigatørfelagnum eru so hørð, at hann skilir tey ikki.

Hann sigur, at Skipara- og navigatørfelagið hevur tikið tað besta úr norska sáttmálanum og tað besta úr danska sáttmálin um og lagt krøvini saman og lagt tey fyri reiðararnar.

Hesum krøvum hava reiðararnir ongan møguleika at ganga á møti.

– Avleiðingin av støðuni er, at skip, sum skuldu undir føroyskt flagg í næstum, varð skrásett á San Vinsent ístaðin. Harafturat fara skip, sum eru undir føroyskum flaggi, nú undir útlendskt flagg. Og tað fer so aftur helst at føra við sær, at tey fara at verða mannað øðrvísi og sostatt fara føroyingar at missa størv umborð við tað, at fleiri útlendingar fara at sigla við.

## Ikki verri fyri

Ellintur Abrahamsen váttar, at teir hava brúkt bæði danska og norska sáttmálan sum grundarlag fyri teirra krøvum.

Tó vísir hann aftur, at tað er ikki rætt, at krøvini eru løgd saman, áðrenn tey eru løgd fyri reiðarafelagið.

– Men støðan er tann, at danir sigla fyri nettolønir, tvs, at manningin betalir ikki skatt. Og tá ið vit so skulu til at rokna danskar nettolønir um til føroyskar bruttolønir, sum manningin skal betala skatt av, er tað skilligt, at tølini blíva nógv hægri

Harumframt er tann danski sáttmálin bygdur á trýskiftisvakt, men vit høvdu gjørt eitt uppskot, sum gav okkum 12 tíma arbeiðsdag og tað er ein rættiliga stórur munur.

Ellintur Abrahamsen sigur, at í Noreg eru bruttolønirnar nógv hægri enn tær donsku.

– Samanumtikið er niðurstøðan, at eru føroyskir sjómenn við fremmandum skipi, havateir nógv meiri eftir, enn teir hava við føroyskum skipi.

Hann sigur, at tað, sum er avgerandi, er, hvat menninir hava eftir tá ið skatturin er betaltur.

– Skipara- og Navigatørfelagið kann ikki góðtaka ein sáttmála, har menninir høvdu verið verri fyri, enn teir eru, nú teir sigla undir útlendskum flaggi.

– Vit ætla ikki at virka fyri, at Føroyar verða eitt hentleikaflagg til hýrur. Og veruleikin er, at føroysku sjómenn fáa munandi meiri við at sigla við skipum undir útlendskum flaggi, enn teir fáa við skipum undir føroyskum flaggi.

– Eru vit ikki kappingarfør á hesum økinum, er bara at ásanna tað. Og so er tað betri fyri teir, at teir sigla undir útlendskum flaggi.

Tí heldur hann, at talan er líka nógv um eitt politiskt mál, har spurningurin er, hvussu nógvan skatt føroyskir sjómenn skulu gjalda av hýruni.

– Vinningurin skal ikki liggja í, at manningarhýrurnar skulu lækkast niður um støði aðrastaðni, leggur hann afturat.

# Sumbingar í rættin við Landsverkfrøðinginum



*Í Lopra liggur ein stór rúgva av gróti, sum rættiligt stríð hevur tikið seg upp um. Nú er tað komið hartil,at tað endar í rættinum, har Landsverkfrøðingurin verður stevndur fyri avtalubrot*

**Sumbingar fara ní í rættin við Landsverkfrøðinginum fyri at fáa hann at halda eina avtalu, sum eir siga at hann hevur gjørt við kommununa**

SUMBA OG LOPRA
*Áki Bertholdsen*

Træta ímillum Sumbingar og vágbingar um, hvør av teimum skal eiga grótið, sum varð sprongt úr Sumbiarbergholinum, endar nú í rættinum.

Talan er um grótið, ið varð sprongt úr bergholinum ímillum Sumba og Lopra og sum nú liggur á goymslu í Lorpanseiði.

Spurningurin er nú, hvør hevur tættin til at fáa grótið, tí nú gera tvær kommunur, Vágs- og Sumbiar, krav uppá grótið

Og nú er málið komið so langt, at Sumbiar Bygdaráð hevur gjørt av at fara í rættin við málinum.

## Orð ímóti orði

Landsverkfrøðingurin hevur játtað Vágs kommunu grótið til at brúka til kommunalar útbyggingar, eitt nú til at fylla út framvið sjónum fyri at gera havnarlagið størri.

Men Sumbiar Kommuna tvíheldur um, at Landsverkfrøðingurin hevði longu frammanundan játtað Sumbiar kommunu rættin til grótið.

Bygdaráðið heldur, at Landsverkfrøðingurin kundi ikki lova grótið burtur tvær ferðir, men av tí at avtalað varð gjørd við Sumbiar Kommunu fyrst, er tað tann avtalan sum er galdandi og ikki avtalan, sum seinni er gjørd við Vágs Kommunu.

Jacob Vestergaard, formaður í Sumbiar kommunu, sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur eisini altíð havt tað siðvenju, at í sambandi við tunnilsgerðir eigur kommunan, sum arbeitt verður í, eisini grótið, sum er sprongt burtur.

Men tað er orð ímóti orði, tí Landsverkfrøðingurin sigur, at hann hevur ikki lovasð okkum grótið, sigur borgarstjórin.

Fyri at fáa málið endaliga avgreitt, hevur Bygdaráðið í Sumba gjørt av at royna málið í rættinum. Har fer bygdaráðið at krevja, at Landsverkfrøðingurin heldur avtaluna, hann hevur gjørt við kommununa.

Har fara væntanti bæði bygdaráðslimir, sum eru nú, og bygdaráðslimir, sum hava sitið áður, at vitna í rættinum.

Somuleiðis fer bygdaráðið helst eisini at leggja fram gerðarbøkur hjá kommununi, har Bygdaráðið hevur tikið avgerð útfrá tí, at avtala var við Landsverkfrøðingin um grótið.

## Fáa 20.000 kubikk

Mett verður, at tilsamans eru tað eini 100.000 kubikk av gróti, sum liggja í Lopranseiði.

Fyribils hevur Sumbiar Kommuna fingið skrivligt loyvi frá Landsverkfrøðinginum at taka 20.000 kubikk, til at fylla upp á havnalagnum í Lopra, har brúk er fyri størri keiøki.

Men kommunan hevur brúk fyri øllum grótinum, tí metingar vísa, at skal alt tað fyllast út, sum kommunan ætlar, verða tað brúk fyri 120.000 kubikkum av gróti, tí tað er rættiliga djúpt ov víðført.

Jacob Vestergaard sigur, at tað er brúk fyri at gera havnalagið størri, fyri at skapa møguleikar til at byggja virki, um áhugi er fyri tí.



# Undantaksloyvir møguliga tikin aftur

**Føroya Pedagogfelag umhugsar í løtuni, um tað skal taka tey undantaksloyvir, ið eru givin, aftur. Spurningurin er, um verkfallið rakar nóg meint, nú fleiri stovnar sleppa at virka, hóast verkfall er lýst. Annars er einki samband millum partarnar í løtuni**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*



*Formaðurin í Føroya Pedagogfelag hóttir nú kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og fíggjarmálastýrið við at taka undantaksloyvir aftur og harvið herða verkfallið MYND: Jens Kr. Vang*

– Tað er uppá tal, at taka tey undantaksloyvi, ið vit hava givið, aftur. Vit viðgjørdu málið týskvøldið saman við álitsfólkum, og tað verður tikið uppaftur á nevndarfundi seinnapartin mikudagin, sigur Carita Bjørklund, formaður í Føroya Pedagogfelag.

Orsøkin, til at pedagogarnir nú umhugsa støðuna í sambandi við undantaksloyvir, er, at verkfallið eftir øllum at døma ikki hevur tað ávirkan, ið ætlanin hjá pedagogunum er.

Carita leggur tó dent á, at nevdin ikki hevur tikið nakra endaliga avgerð viðvíkjandi undantaksloyvum, men hon ásannar samstundis, at verkfallið kanska ikki er nóg effektivt, tá so nógv undantaksloyvi verða givin.

## Farið bara í verkfall

– Vit fingu at vita frá okkara mótparti, at tað hevði ongan týdning, um vit fóru í verkfall ella ikki, tí nóg nógvir tænastumenn vóru at røkja okkara starvsøki, sigur Carita.

Formaðurin sigur, at felagið hevur givið nøkur undantaksloyvi, har talan er um fólk við breki, og sum eru illa fyri. Tey tola tí ikki stórar broytingar, og tað hevur felagið tikið hædd fyri. Tilsamans hava eini fimm stovnar fingið undantaksloyvi at hava nøkur starvsfólk afturat, ið annars høvdu verið í verkfalli.

Hon ásannar, at størri trýst hevði verið lagt á kommunurnar og fíggjarmálastýrið, um einki undantaksloyvi varð givið. Kanska kann tað fáa partarnar aftur til samráðingarborðið.

Sambært Caritu er tað mótparturin, ið hevur brotið eina avtalu, men tó eru tey altíð fús at samráðast. Pedagogarnir hava arbeitt uttan sáttmála í níggju mánaðir, og støðan er ótolandi.

– Limir okkara eru í eini ótolandi støðu og eru farnir at ótolnast. Tí mugu vit kanska herða verkfallið, sigur Carita Bjørklund.

Seinast pedagogarnir høvdu samband við semingsfólkini var sunnudagin, og síðani hava tey einki hoyrt. Samskiftið er tí ikki stórt millum pedagogfelagið og kommunalu arbeiðsgevarafeløgini.

# Býráðið ikki tikið støðu

**Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini, sigur, at býráðið ikki hevur umrøtt málið, hvørt foreldur skulu lata fult ansingargjald til dagstovnarnar, hóast tey einki fáa aftur fyri**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

– Enn hevur býráðið einki krav fingið frá nøkrum, sum ikki ætlar sær at gjalda fult ansingargjald. Um eitt slíkt krav kemur, fara vit at taka málið upp politiskt, sigur Heðin Mortensen, ið er formaður í mentamálanevndini, ið hevur barnaansing undir sær. Hann vísir tó á, at foreldur altíð hava goldið, hóast verkfall hevur verið.

Hann heldur ikki, at foreldur fara víðari við málinum, um verkfallið endar brátt, men um tað verður drúgt, so er tað sjálvandi ein spurningur, ið býráðið skal taka sær av. Enn hevur býráðið tó ikki viðgjørt henda spurningin.

## Mugu tosa saman

Heðin heldur annars, at tað er burturvið, at partarnir als ikki tosa saman. Tað stendur nógv á arbeiðsmarknaðinum, tí foreldur sleppa ikki til arbeiðis vegna verkfallið. Eitt stendur fast, og tað er, at so leingi partarnir ikki samskifta, verður eingin loysn.

Borgarstjórin í Klaksvík segði í Útvarpi Føroya í týsdagin, at kommunan sparir einar 50.000 krónur um dagin, meðan pedagogar ikki eru til arbeiðis. Heðin vil als ikki tosa um at spara pening í hesum førinum.

– Vit spara einki. Vit hava fleiri ónøgdar borgarar, ið ikki fáa børnini ansaði og sleppa tí ikki til arbeiðis. Eisini hava vit eitt vinnulív, ið ikki fær virka til fulnar, so har er eingin sparing, tí eingin fyrimunur er við verkfallinum, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur seg tó skilja tey foreldur, ið ikki eru sinnað at gjalda fyri nakað, tey ikki fáa, tí í longdini ber tað als ikki til. Um verkfallið ikki dregur út, verður neyvan gjørt meira við málið, men um tað hinvegin verður drúgt, má okkurt gerast hesum viðvíkjandi, og tað verður tikið upp politiskt.

Hann tekur undir við, at foreldur hava rætt at spyrja, hvat hendir, tá tú rindar fyri nakað, tú ikki fært.



*Heðin Mortensen væntar ikki, at foreldur fara at krevja at sleppa undan ansingargjaldinum, um verkfallið endar skjótt. Um tað hinvegin verður drúgt, so má spurningurin takast upp, tí hvat hendir, tá fólk gjalda fyri nakað, tey ikki fáa*

# Lars Løkke verður ráðharri

**Næstformaðurin í flokkinum Venstre, Lars Løkke Rasmussen, ið hevur føroyska konu, verður innanríkis- og heilsumálaráðharri**

RÁÐHARRI
*Stefan í Skorini*



*Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen úr Føroyum verður nú ráðharrafrúa, tí maður hennara, Lars Løkke Rasmussen, verður ráðharri í nýggju donsku stjórnini*

Í seinastu viku skrivaðu vit um Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, ið er gift næstformanninum í Venstre, Lars Løkke Rasmussen.

Tey vórðu bæði afturvald til valini, ið vóru 20. november. Hon varð afturvald í býráðið, meðan hann varð afturvaldur til amtsborgarstjóra í Fredriksborg á Norðursælandi. Sessin sum amtsborgmeistari skal onkur annar nú røkja, tí Anders Fogh Rasmussen hevur sent boð eftir Lars Løkke.

Hann skal nevniliga verða innanríkis- og heilsumálaráðharri í nýggju stjórini, sum Anders Fogh hevur sett saman. Hetta er ein nýggjur sessur, tí eingin hevur havt júst hesi bæði málini undir sær.

Lars Løkke Rasmussen hevur verið aktivur í politikki síðan 1986, tá hann varð valdur inn í býráðið í heimbýnum. Í 1998 gjørdist hann amtsborgarstjóri sum tann yngsti í søgu Danmarkar. Hann er í dag 36 ára gamal og hevur m.a. skrivað eina kjakbók um eldrapolitikk.

Ráðharrarnir eru allir úr Venstre og Konservativa flokkinum. Átjan ráðharrar eru tilsamans. Formaðurin í Venstre, Anders Fogh Rasmussen, verður forsætisráðharri, og formaðurin í Konservativa flokkinum, Bendt Bendtsen, verður búskapar- og vinnumálaráðharri.

Venstre eigur tólv ráðharrar, meðan konservativi flokkurin hevur seks.